# Ferðslutrygd við nýggjari styrki

**Í samband við ársfundin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum verður á Hotel Føroyum í dag kl. 12, sigur Rúna Sivertsen, formaður í Ferðslutrygd, í samrøðu við Sosialin, nakað um ferðslutrygdararbeiði**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Grannalond okkara hava seinastu árini satsað nógv upp á ferðslutrygdina, og nú heldur ferðslutrygdararbeiðið í grannalandi okkara Noregi fram við nýggjari styrki. Ein nýggj virkisætlan fyri ferðslutrygd, við 234 tiltøkum, skal tryggja, at minkingin av deyðum og illa løstaðum í ferðsluni har heldur fram.

Eisini í Føroyum eru ferðsluvanlukkur ein stórur samfelags-trupulleiki. Eitt er kostnaðurin hjá samfelagnum, men fyrst og fremst eiga vit at hava tær menniskjansligu líðingarnar í huga. Positiva gongdin seinastu árini, hevur tíverri ikki verið eins týðilig ímillum tey ungu í ferðsluni. Tí verður neyðugt at varpa serligt ljós hesi.

Í Noregi, er málið, at innan 2010 skal talið á deyðum og illa løstaðum í aldursbólkinum 15-24 ár minkast við 25 prosentum, og við 50 prosentum innan 2016. Sama mál mugu vit seta okkum í Føroyum.

Nú Nullhugsjónin verður staðfest í ferðslulógini, verður næsta stigið at gera eina landsvirkisætlan fyri ferðslutrygd í Føroyum.

Skulu vit náa málinum, sum Nullhugsjónin leggur upp til, so er neyðugt við eini landsvirkisætlan fyri ferðslutrygd.

### Taka lógvatak saman

Ein betri samskipan av arbeiðinum er neyðug og fer at geva úrslit. Við Nullhugsjónini sum grundarlagi, skal landsvirkisætlanin leggja langtíðar stevnumið.

Umframt teir partar, sum í dag fáast við ferðslutrygdararbeiði, eiga Mentamálaráðið og Almanna- og heilsumálarráðið at fáa ein virknan leiklut.

Vinnumálaráðið bað fyri kortum Landsverk taka sær av at røkja ferðsluhagtøl. Haldgóð hagtøl fara geva eitt betur grundarlag fyri raðfestingum og tiltøkum í ferðsluni.

### Avbjóðingar framyvir.

Síðani Ráðið fyri Ferðslutrygd, fyri 30 árum síðani, byrjaði sítt virksemi er talið á bilum í Føroyum trífaldað. Virksemið RFFs er støðugt økt øll árini. Avbjóðingarnar hjá stovninum framyvir verða:

- at sannføra myndugleikarnar um, at ferðsluvanlukkur ikki kunnu góðtakast
- at fáa ein virknan leiklut í arbeiðinum, har avgerðirnar um ferðslu verða tiknar
- Ferðslutrydararbeiðið ber frukt

Langtíðar ferðslutrygdararbeiði virkar. Grannalond okkara síggja nú fruktina av arbeiðinum, sum hevur verið gjørt fyri ferðslutrygdina, og tølini á deyðum og skaddum í ferðsluni minkar alsamt.

Á sama hátt, sum í okkara grannalondum, eigur politiski myndugleikin í Føroyum at fara undir hetta álvarsmál og leggja alla styrki í ferðslutrygdararbeiðið.



*The Reverends er góðskukontri (mynd: Símun Jóannesarson)*

## Prædikumenn á asfalt

**Nógv ymisk rák innan føroyskan tónleik eru higartil avdúkaði á asfalt. Men í dag var fyrsti kontribólkurin avdúkaður. Talan er um The Reverends, ið man vera tann besti føroyski kontribólkurin í løtuni.**

FESTIVAL SUMMARIÐ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Asfalt kunngerð á heimasíðu síni í morgun, at kontribólkurin The Reverends verður millum nøvnini á tónleikatiltakinum.

The Reverends hevur tann karismatiska Mold oddamannin Niklas Thorsteinsson, sum sangara og ein flokk av garvaðum rokktónleikarum aftanfyri hann. Men her er ikki talan ein rokkbólk av tí harðara slagnum. The Reverends eru ein ordiligur kontribólkur av tí slagnum, sum spælir rátt og ópolera kontri við tekstum um sjálvmorð, morð, hjúnarskilna, svik og drukk, spældir við rætta kontri anda, og av monnum í kovboyhattum, kovboyslipsum og styvlum. Bólkurin spælir eitt bland av teirra egna kontri og løgum hjá øðrum, m.a snýkir ein tillagaður Mold klassikari seg inn í spæliskránna undir heitinum "Back To Texas". Men eisini løg hjá t.d. Johnny Cash, Alan Jackson, Randy Travis, Garth Brooks og Frank Zappa, blandað við rættiliga fitt av Blue Grass.

The Reverends hevur seinastu árini spælt til dans í føroyska útisetaumhvørvinum í Danmark, umframt kontrikonsertir í donskum spælistøðum, m.a. annað í háttvirda blues spæli-staðnum MOJO í miðbýnum í Keypmannahavn. Í fjør summar var bólkurin somuleiðis rundferð í Føroyum.

Í løtuni arbeiðir The Reverends við síni fyrstu fløgu útgávu.

## VIÐMERKINGAR

# Setið eina óhefta kanning sett í verk

GUNNVØR POULSEN
omma Petur

Í Dimmalætting frá 21. mars læs eg eitt bræv frá einum veljara við yvirskriftini »Fyrispurningur til Miðflokkin og Tjóðveldisflokkin um lítla Petur«

Eg havi hugt í bløðini at vita, nær onkur av politikarunum fóru at svara aftur, men ongin hevur ønt hesum veljara nakað svar, ætla tit at lata sum einki og niðurgera hendan veljaran, tit eru valdir at tæna okkum, sum hava valt tykkum, tað mugu tit ikki gloyma.

Sjálvt um tað er gingið 1/2 ár síðani Miðflokkurin legði munnliga fyrispurningin til Hans Paula Strøm fram, so er tann skrivligi fyrispurningurin ikki lagdur fram enn, sum teir ætlaðu. Er tað nøktandi, at Hans Pauli Strøm bara kann svara aftur, sum tað fellur honum inn, og so verður onki meira gjørt við tað?

Til tín Høgna Hoydal, nær ætlar Tjóðveldisflokkurin at seta eina óhefta kanning í verk í Føroyum? Tú spurdi Evu Kjer Hansen, sosialministara, hvussu hon fór at tryggja, at málið var kannað á nøktandi hátt, tá hon boðaði frá, at hon fór at kanna málið niðri í Danmark, tað má so sanniliga eisini kannast í Føroyum, tí her er eisini nógv skeivt farið fram viðvíkjandi málinum.

Tann 15. februar 2006 vóru vit fýra fólk á fundi við Alfred Olsen og Kaj Leo Johannesen úr Sambandsflokkinum, og virkaðu teir interesseraðir og skuldu vit hoyra aftur frá teimum, men enn ikki eitt orð, kanska Johan Dahl fer at taka málið upp.

Hvat ræðast tit, er ongin rættvísur politikkari til.

Nú er upp á tíðina at skipa fyri einum hóskandi tilboð, soleiðis at Petur kann koma heim aftur itl Føroyar.

Eg fari eisini at heita á allar tingmenn um at seta eina óhefta kanning í verk, ongantíð ov skjótt.

# Er fiskimálaráðharrin nú aftur í ferð við at avreiða fiskatilfeingi til útlendingar?



ATLI HANSEN
formaður Felagið Nótaskip

Hesin fiskimálaráðharrin fer valla í søguna sum ein íð legði tær stóru linjurnar inn í framtíðina fyri føroyskan fiskivinnupolitikk, men heldur sum ein íð tók sær av einkultmálum og serliga einum skipabólki nevniliga ídnaðarskipunum.

Fyri tey flestu onnur í hesum landinum hevur bólkurin ídnaðarskip í veruleikanum í nógv ár verið so gott sum ikki eksisterandi og ikki luttikið í bruttotjóðarframleiðsluni. Hann er fyri tað mesta ogn hjá útlendingum og hevur stórt sæð ikki verið til fiskiskap men bert ligið passivur við teymin og bíða eftir at svartkjafturin varð útlutaður, meðni hini føroysku svartkjaftareiðaríini hava gjørt íløgur fyri hundratals milliónir fyri at fiska okkum søgulig rættindir. Skulu tey nú latast til útlendingar, sum einki hava gjørt?

Fiskimálaráðharrin hevur í fleiri ár verið upptikin av út at lata alt meira av øðrum kvotum til hesi skip uttan at tað tó var útlit til, at tey loystu frá landi og tað kann ein undrast yvir. Fyrst fingu hesi skipini tað sindrið vit áttu av sild í Norðsjónum fyri at kunna fiska tað sum hjáveiðu. Henda kvotan varð tí ikki fiskað í fleiri ár.

Í fjør var tað so umráðandi fyri landsstýrismannin at hesi skipini eisini skuldu fáa nakað av norðhavssildini. Grundgevingin var, at landsstýrismaðurin vildi tryggja sær, at kvotan varð uppfiskað. Undarligt at biðja skip, sum ikki kunnu fiska sild um hjálp til at fiska kvotuna upp. Og hvør mátti so til síðst gera hetta ? Nótaskipini sjálvandi í einum loyviskaosi skapt av hesum sama landsstýrismanninum.

Og nú ljóðar – og tað hevur ljóðað leingi – at landsstýrismaðurin ætlar at skriva hetta sama sildaloyvi út til ídnaðarbátarnar aftur í ár. Hví henda umsorgan?

Hvat er tað sum her fer fram?

Tað ljóðar – og hevur ljóðað í eina tíð, at hesir ídnaðarbátar umsíður nú kunnu seljast og eru á veg til at verða seldir til útlendingar fyri ein góðan prís. Og hví? Hetta minnir okkum ikki sørt um tveir frystitogarar, sum vóru seldir fyri nøkrum árum síðan. Tá íð man umsíður hevði fingið lagt hópin av sildakvotu yvir á teir, so kundu teir seljast fyri uml. 10 mió. kr. hvør. Áðrenn ta tíð høvdu teir staðið til sølu í áravís fyri 4 mió. kr. hvør – og kundu ikki seljast.

Fleiri av ídnaðarskipunum eru helst ikki meira verd enn stálprísin, men nú sigast tey at kunna seljast fyri 14 mió. kr. pr. stk.

Øll hesi loyvini vóru í 1996 minkaðai til 20 % av einum ídnaðarloyvi. Reiðaríini fingu endurgjald fyri hini 80 % av loyvinum. Nú eru tey aftur – hokus pokus – 100 % ella meira. Fer ein handil fram nú, eigur man í minsta lagi at mótrokna tað endurgjaldi til landskassan, sum vist var út ímóti 20 mió. kr. tilsamans.Skilji alt hetta hvør íð kann.